# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Bára Joensen, Erik Johannessen og Janus Joensen frá kavaraskúlanum Faroe Dive*

Faroe Dive, Klaksvík:

## Bára og Erik fingið kavaraprógv

TÍÐINDASKRIV

Mánadagin 14. juni fingu Bára Joensen, Klaksvík, og Erik Johannessen, Strendur, prógv frá kavaraskúlanum Faroe Dive. Tey hava í eitt tíðarskeið ognað sær vitan um kaving. Millum annað hava tey verið undirvíst í kavarateori, kaving í svimjihøll og ikki minst kaving í sjónum. Bára og Erik hava bæði verið sera vælnøgd við kavingina og hava ætlanir um at gera nógv við at kava.

## Sune Joensen 75 ár



Í dag, 28. juni 2006, fyllir Sune Joensen í Havn 75 ár.

Sune er sandvíkingur, men hann hevur búð í Havn meginmaptin av lívi sínum.

Sum teir flestu ungu dreingir, tá hann var ungur, fór Suni til skips. Hann búði eisini eitt stutt skifti í Skúvoy, áðrenn hann kom til Havnar. Hann er kanska mest kendur frá sínum starvi á Brunatrygging, har hann lærdi og arbeiddi í yvir 40 ár, tey seinastu árini sum stjóri.

Sune er málkønur og skrivandi maður. Hann hevur skriva fleiri stuttsøgur um ymisk heimlig viðurskifti í Føroyum, sum t.d. um hvussu lívið var á bygd og um sjólívið. Fleiri av hesum stuttsøgum eru lisnar upp í útvarpinum og hava staðið í føroyskum tíðarritum. Hann hevur t.d. umsett bókina „Fangi Norðbúgvanna“ eftir Einar Schroll og gjørt eina føroyska útgávu av eini stenografilærubók. Hann hevur eisini undirvíst í stenografi.

Sune hevur verið virkin í KFUM, har hann var skótaleiðari í mong ár. Í dag er hann við í Varðmonnum (eldri skótar). Hann er eisini formaður í pensionistafelagnum í Havn, har hann er sera virkin og er við í nógvum ymiskum tiltøkum.

Foreldrini hjá Suna vóru Sigrid og Niclas Joensen í Sandvík. Sune er giftur Paulu, f. Joensen úr Haldarsvík, dóttir Astrid og Hans Paula Joensen, vanliga nevndur Hans Pauli á Bø.

Paula og Sune eiga fýra børn: Niclas, sum býr á Argjum, Astrid og Hans Pauli, sum búgva í Havn, og Sigrid, sum býr í Skálavík. Barnabørnini eru fimm í tali.

Føðingardagurin verður hildin í Losjuni fyri innbodum.

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantarnir 14. apríl 1918



Konfirmantarnir 14. apríl 1918: Myndin er av konfirmantunum 14. apríl 1918. Á myndini eru 15 konfirmantar, men 17 blivu fermdir, t.v.s. at tveir eru ikki við á myndini. Av teimum 10, sum standa í aftastu røð, kenna vit bert 6, teir eru: nr 1) Aleksander Samuelsen (Havn) nr. 3) Vilhelm Jacobsen (Havn), nr. 7) Frida Helene Marie Joensen (Nólsoy), nr. 8) Hilmar Mikkelsen (Havn), nr. 9) Johannes Nolsø (Nólsoy) og nr. 10) Johannes Hansen »Nis«. Av teimum 5 sum sita fremst, kenna vit bert nr. 1 f.v., tað er Joen Mittún (Havn). Teir konfirmantarnir vit ikki hava fingið navngivið, eru: Hans Pauli Danielsen, Carl Vilhelm Hansen, Lise Margrethe Jakobsen, Anna Louise Vigelund, Andrea Martine Sofie Helene Andreasen, Birthe Helene Weihe, Anna Elisabeth Mortensen, Christine Marie Olsen og Marie Christiansen, hesir vóru allir úr Havn. Síðani var tað Daniel Pauli Mortensen av Argjum. Teir lesararnir ið kunnu hjálpa við at fáa nøvnini sum mangla uppá pláss, verða vinarliga bidnir um at ringja til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

Halla Nolsøe Poulsen:

## Prógv sum stjórnmálafrøðingur



Halla Nolsøe Poulsen, Froðba, hevur tann 20 februar 2006 lokið prógv sum stjórnmálafrøðingur við lærda háskúlan í Keypmannahavn.

Halla hevur í síni lestrartíð starvast í danska Umhvørvismálaráðnum, og hevur arbeitt á donsku sendistovuni í Washington.

Hon starvast nú í uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni.